# Høllin kemur




**Hóast nýggja Badmintonhøllin í Klaksvík ikki er tikin í brúk enn, er longu líkt til at áhugin fyri hesi ítróttargreinini er vaksandi í býnum.**
**– Vit hoyra dag og dagliga fólk siga, at tey fara at spæla badminton, tá høllin kemur. Hetta skuldi verið tekin um, at høllin kemur í tøkum tíma, sigur Jákup Anthoniussen, formaður í Klaksvíkar Badmintonfelag**



**BADMINTON**
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík**: – Eg haldi sjálvur, at badminton er ein sera góður ítróttur. Her er jú eingin skiftibonkur, so tú sleppur at spæla so leingi sum tú vilt.

- Man er "on" alla tíðina, sigur Jákup, nú hann er komin eitt ørindi í høllina, sum verður tikin í brúk í summar.

Júst hetta er eisini ætlanin, - at limirnir í felagi hansara skulu sleppa, nú tað líður so væl við byggingini av hesi stóru og væl útgjørdu høllini á ítróttarøkinum í Klaksvík.

Sjálv høllin er 48 metrar til longdar, og tað merkir at gott pláss er handan bæði málini. Kostnaðurin er mettur til 15 mió kr.

Seinni í summar verður høllin tikin í nýtslu, og tað er ikki frítt, at fólk í Klaksvík eru spent til henda dagin.

– Tað hevur ikki staðið á at leiga vallirnar út til okkara limir.

Tímarnir ganga sum heitt breyð, sum Jákup Anthoniussen brosandi tekur til.

### Í síðstu løtu

Hetta er kortini ikki fyrstu ferð, at Badmintonfelagið hevur havt ætlanir um eina høll til virknu limir sínar.

Tað munnu vera eini 20 ár síðani, at Mikkjal og Jákup Mikkelsen sum tá stóðu á odda fyri felagnum, arbeiddu ídnir fyri at fáa bygt eina slíka høll. Hetta eydnaðist ikki tá, hóast teir vóru komnir rættiliga væl áleiðis við ætlanini.

– Sum eg havi skilt tað, datt ætlanin á gólvið í allar seinastu løtu. Tað var eitt øgiligt spell, at hon ikki kom tá, staðfestir Jákup.

Ikki fyrrenn í hansara tíð sum formaður, skuldi tað altso eydnast. Og um fáar vikur sleppa teir

## Spentir badminton-spælarar

**Klaksvíkar Badmintonfelag er í dag at meta sum eitt virkið felag.**

**Eitt er tað, at felagið er farið undir hesa stóru byggiætlanina, saman við øðrum feløgum. Men Jákup og hini í felagnum kunnu somuleiðis fegnast um, at nógv spæla badminton í løtuni.**

**Onkutíð hevur limatalið táttað í tey 100, men hevur sum skilst ongatíð verið niðanfyri 50. Tað góða er, at millum tey virknu í felagnum eru eini 30 ung, sum eisini luttaka í m.a. FM-kappingum.**

**Felagið hevur øll árini virkað undir skiftandi umstøðum. Í Klaksvík er bert tann eina ítróttarhøllin - KÍ-høllin - og hon er farin at nærkast teimum 40 árunum. Nógv virksemi í Klaksvík, og pláss er ikki fyri øllum hesum ítróttarliga virkseminum í hesi einstøku høllini.**

**Seinni í ár fáa so limirnir í Badmintonfelagnum umstøður, sum teir nærum bert høvdu droymt um fyri einum ári síðani.**

**Sum nevnt aðrastaðni er áhugin fyri badminton alsamt vaksandi í Klaksvík. Nýggja høllin fer helst at gera henda áhugan enn størri.**

## 1000 áskoðarar

Uttan góðar umstøður til áskoðararnar er høllin ikki fullkomin. Hetta hava Jákup og hansara fólk sjálvandi eisini hugsað um.

Á báðum síðum verður gott pláss til tey, sum í framtíðini fara at hyggja eftir dystum av ymiskum slagi.

Í niðaru síðuni verða fimm røð av setrum til áskoðararnar. Roknað verður í miðal við, at tveir áskoðarar kunnu sita fyri hvønn meturin.

- Saman við áskoðaraplássunum á hinari síðuni og við balkongini meta vit, at eini 8-900 fólk - kanska heilt upp ímóti 1000 - sleppa inn her samstundis, sigur formaðurin í Badmintonfelagnum.